# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 25. oktober 2012, kl. $19^{00}$.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 98**
Fíggjarætlan 2013 – uppskot til framløgu/1. viðgerð.
J. nr. 2009-499
Uppskotið til framløguna til 1. viðgerð varð gjøgnumgingið.
Borgarstjórin mælti til at leggja uppskotið fyri bygdarráðið til 1. viðgerð. Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Viðv. 98**
Uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013 varð lagt fram til 1. viðgerð.

**Mál 99**
Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 18. oktober 2012 møguliga sølu av bygningum hjá Vestmanna Kommunu. Á fundi tann 4. oktober 2012 var semja í bygdarráðnum um at seta Eldrasambýlið og skrivstovubygningin á Fitjum (gamli skrivstovubygningurin hjá SEV) til sølu.

Nevndin mælir bygdarráðnum til at seta Eldrasambýlið, Reynslíð 3, matr. nr. 282ak til sølu og selja tað, um hóskandi boð fæst.

**Viðv. 99**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 100**
Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 18. oktober 2012 møguliga sølu av bygningum hjá Vestmanna Kommunu. Á fundi tann 4. oktober 2012 var semja í bygdarráðnum um at seta Eldrasambýlið og skrivstovubygningin á Fitjum (gamli skrivstovubygningurin hjá SEV) til sølu.

Nevndin mælir bygdarráðnum til at seta skrivstovubygningin á Fitjum, Niðari Vegur 28, matr. nr. 266a (gamla skrivstovubygningin hjá SEV) til sølu og selja hann, um hóskandi boð fæst.

**Mál 101**
Parkeringsviðurskiftini á Byrgisvegi.
J. nr. 2009-254
Nevndin mælir til at taka av tilboði frá Jákup Martin Andreasen uppá 25.000 kr. sum gjald fyri lendi og fyri tað arbeiði, hann higartil hevur gjørt, og við teimum treytum, Jákup Martin setur afturfyri.

**Viðv. 101**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30

Sign.:

Karl A. Olsen    Herit Magnussen    Pauli T. Petersen

Evelyn Gaard    Jón Mikkelsen    Bárður Poulsen    Siri S. Niclassen